# Byrja hvønn fund á »ground zero«

ÓLAVUR
Í BEITI
Rithøvundur



Tað kom ikki stórt nýtt fram í svarinum hjá formanninum í Mentanargrunninum, men eg beit merki í eitt sum formaðurin segði, at: »Vit hava valt at byrja á berum, hvørja ferð nýggju umsóknirnar skulu viðgerast.....« citat úr samrøðuni í Sosialinum. Og so kemur okkurt aftaná í sama broti, sum ger, at eg ivist hvat formaðurin hugsar um, men óivað er hetta stórar hugsanir.

Men hetta at til hvønn fund hjá Mentanargrunninum verður byrjað á berum, sigur mær kanska, at formaðurin meinar við at allir umsøkjarar hava sama møguleika at fáa, tá nýggju umsóknirnar skulu viðgerast! Tað vil siga at byrjað verður á »ground zero« hvønn fund!

So kunnu vit spyrja, tá ein høvundur søkir í áravís um starvsløn til sama verk og fær, er tað so eisini ein nýggj umsókn hvørjaferð?

Ella játtar Mentanargrunnurin tá eftir hvørja ferð høvundin skrivar ein nýggjan kapitul?

Og hvussu leingi kann Mentanargrunnurin játta starvsløn til sama verk? Hvussu nógv ár?

Hetta haldi eg má broytast í lógini fyri grunnin, at ein og sami persónur fær starvsløn í áravís til sama verk, tí tað hevur tað verið í førinum Carl J Jensen sum einki hevur givið út øll árini fram til 2005, men kortini fingið fleiri ferðir til sama verk, ja heilar 560.000 krónur.

Og so vita vit ikki hvussu nógvar starvslønir hann hevur fingið úr Mentanargrunni Føroya Løgtings, tað sigur søgan einki um, men sjálvur sigur høvundin at hann skrivaði bókina í 8 ár.

Nú er tað sjálvandi nakað ymiskt hvussu leingi tað tekur at skriva eina bók, men 8 ár ljóðar sum ein joke í mínari verð. Men tá vit skilja at hesin høvundin eisini hevur starvast sum blaðmaður á Fregnum, ja so er starvslønin ikki játtað til sjálvt verkið eina, men sum eitt slag av ískoyti, kanska sosialt ískoyti. Og tað sigur formaðurin at grunnurin ikki játtar.

**Dygd**

"Vit verða neyvan nakrantíð samd um, hvat listarlig góðska er, men í okkara viðgerðum av umsóknum um starvsløn vigar tað listarliga skapandi ella nýskapandi rættiliga tungt", soleiðis sigur formaðurin í Mentanargrunninum í Sosialinum.

Og her eri eg samdur at torført er at seta upp frimil um dygd, ja púra ógjørligt, tí altíð er talan um persónliga uppliving av einum listaverki – bók, tónleiki ella málningi.

Men spurningurin er, hvussu kann nevndin vita um dygdina á einum verki út frá eini umsókn? Hvørjar mátistokkar brúkar nevndin til tess? Og hvussu visti nevndin í 2001 at fyrra bókin hjá Jústinus L Eidesgaard fór at koma út, meðan Carl J Jensen einki gav út fyrr enn í 2005, tá hann hevði fingið 560.000 krónur?

Eg havi stóran mistanka um at henda nevndin við Róa Patursyni sum formanni, hevur fleiri dagskráir enn formaðurin sigur, og Jústinus L Eidesgaard nevnir sjálvur eina at kanska skrivaði hann um persón við skeivum liti og skeivari trúgv, meðan høvundar sum svíndálka eitt nú "baptistar" aftur og aftur í sínum skaldskapi, teir fáa bara teir senda umsókn inn.

**Eingin nýskapan**

Eg havi ilt við at skilja hetta at senda umsókn inn um starvsløn og hava frágreiðing um verkið, at Mentanargrunnurin hevur slíkan førleika at døma út frá frágreiðingini um hetta er nýskapandi og/ella listarliga skapandi!

Men her sigur formaðurin so, at skorið verður ígjøgnum, tikin verður ein avgerð! Og avgerðin sambært listanum fellur á teir somu!

Ein tónasmiður sendir inn umsókn um starvsløn í eitt ár, tí hann skal skapa eitt verk sum eitur "Várblá nátt á strond" og í føgrum hugleiðingum og texti skrivar hann um verkið og at hetta er súmfoni í b-mol við 4 satsum. Blásarar eru eisini við í síðsta satsinum!

Til sama fund sendur ein yrkjari umsókn inn eisini um eitt ár, tí hann er farin undir yrkingarsavnið "Gongulop" og eru hetta yrkingar sum hava uppruna í Miðeystri eftir ferð, men verða yrktar undir føroyskum lofti og á føroyskari mold.

Og ungur høvundur hevur eisini umsókn til sama fund um at fáa styrk í eitt ár at skriva skaldsøguna "Mamma gongur sum ein dunna" og hevur hann eisini ómaka sær at skriva dispositión um bókina, og at hon verður eini 90.000 orð. Vit avdúka ikki her, hvussu bókin endar!

So mugu vit ikki gloyma – og her er ikki neyðugt at siga nøvn – at gamal kenningur hjá grunninum sendir eisini umsókn inn um eitt ára starvsløn og bókin er tann sama sum hann søkti um í fjør! Hann hevur skrivað ein triðing av bókini nú, men eitt ár aftrat má hann hava!

Hetta er sjálvandi eitt tiltonkt dømi, men kundi fyri tað verið satt, og kanska eru fleiri meiningar um, hvat er mest nýskapandi og listarliga skapandi av hesum, og um ikki øll eru tað! Men út frá játtanarlistanum hjá Mentanargrunninum, so er eingin ivi, at tann sum hevði søkt fyrr og hevði fingið, ja hann fær aftur í ár!

Og her er tað at vit renna okkum í stóra trupulleikan tá vit nú vita hvussu Mentanargrunnurin játtar, at fleiri ungir høvundar hava ongan møguleika at koma framat og fáa umstøður at skriva, tí teir somu fáa aftur og aftur, ár undan ári.

Hetta er ikki nakað eg hugsi mær til at so er, eg veit eisini frá onkrum sum hevur fingurin á pulsinum sum sigur tað sama, at fara allar játtanirnar til teir somu ár undan ári, ja so verður eingin menning í, eingin nýskapan!

**Alneyðugt**

So út frá tí sum Jústinus L Eidesgaard hevur ført fram og út frá tí sum fram er komið higartil um játtanirnar til starvslønir, so er sera týðandi at vit fáa sett eitt háloft á, hvussu nógv ár tú kanst søkja og fáa til sama verk!

Tann stóra starvslønin er 3 ár, og mær tikir tó at eg ikki veit tað at eingin sum hevur fingið hana fer at søkja aftur um hana. Henda starvlønin vísir seg at vera oyramerkt til eina ávísa uppgávu, og so skal uppgávan verða loyst hesa tíð. Tað liggur líkasum nakað stórt í hesi starvsløn, eitt stórt verk av einum ella øðrum slagi, og viðkomandi fær rúmar ræsur at gera verkið liðugt, heili 3 ár!

Kanska eitt ára starvlønin eisini átti at veri hesi meiri lík í so máta at hon er oyramerkt til eitt ávíst verk sum verður liðugt eftir einum ári! Tí sum støðan er nú kanst tú um tú hevur rættan lit og røttu uppskrift fáa í áravís til sama verk og harvið spenna bein fyri øðrum sum ikki høvdu alt hetta!

Og tað ger einki um alt hetta verður tikið upp til viðgerðar, tí sum støðan er nú, ja so er hetta ikki nakað mennandi fyri føroyskja mentan!

**Ein viðurkenning**

Tað er ein viðurkenning at fáa slíka starvsløn, verði hon seg 3 ár ella 1 ár, ja sjálvt í hálvt ár! Og tað eigur eisini at verða so, at tað skal verða á hesum støði at hetta er ein viðurkenning og við ábyrgd sjálvandi!

Mangan havi eg sitið ella ligið og droymt um at fingið eina opinbáring um eitt verk sum var búgvið til umsókn til 3 ára starvsløn, ella bara eitt ár, men ikki enn er henda sæla fallin mær í lut, men kanska einaferð hon kemur – opinbáringin!

Men ansa vit ikki eftir og sum tað eisini sæst á játtanarlistanum hjá Mentanargrunninum, ja so verður hetta ikki nøkur viðurkenning longur, men ein skomm!

# Búskaparlig ábyrgd – hvat er tað?

GUNNAR K
NATTESTAD



**Skeivur boðskapur**

Undanfarna samgonga var ógvuliga upptikin av at seta misálit á okkara støðu sum tjóð í ríkinum. Javnan var sagt, at vit ongi rættindi høvdu innanfyri og sjálvt har, ið mál vóru yvirtikin, høvdu vit í veruleikanum einki at skula havt sagt.

Millum annað koyrdi Tjóðveldisflokkurin eina lýsingarherferð ímóti at vit eiga okkara egnu undirgrund og tað, sum í henni er. Samstundis var hildið uppá, at nú var olja funnin, og vit kundu taka loysing, tí tað var ikki longur brúk fyri blokkinum.

**Nøkur læra seinni enn onnur**

Nú sær tíbetur út til, at flokkarnir, ið vóru umboðaðir í samgongu tá, hava tikið annað skinn um bak. Vit hoyra stórtsæð einki longur um at danskarar koma at taka okkara olju ella nakað líknandi, og hóast onkur framvegis kemur upp at blása um at vit eru danskir trælir og at vit spæla fólk í húsi, so er vit vónandi komin har til, at vit duga at síggja, at vit fáa tað ríkisrættarligu skipan vit (ein meiriluti av fólkinum) vilja hava. Undirlagt hesum er sjálvandi eisini, at vit hava evstu ábyrgd av øllum øðrum ið hendur her á landi, m.a. fíggjarligu viðurskiftunum

**Halta til báðar síðir**

Tað er tí eitt sindur forargiligt tá tjóðveldisflokkurin roynir at reklamera fyri teirra ivasamu fíggjarligu ábyrgd, m.a. við at spyrja eftir hvussu nógv skuldin er niðurgoldin undir hesi samgongu í mun til undir fullveldissamgongunum.

Eyðvita er at tíðirnar síðani hendan samgongan kom til, hava verið nógv verri enn vit upplivdu seinnu hálvu av 90'unum og fyrstu árini av nýggju øldini. Tá undanfarna samgonga aftrat hesum, ikki hevði dirvi til at skera blokkin fyrr enn móti endanum av valskeiðnum, tó uttan at tora at skera almennu útreiðslurnar á sama hátt, so skilja tey flestu, at fyritreytirnar fyri at gjalda niður skuld eru ymiskar. Tað er hóast alt lættari at rulla steinar omanbrekku enn mótbrekku.

**At taka við ábyrgd**

Tað ber væl til at hava formella ábyrgd og allíkavæl vera ábyrgdarleysur, eins væl og tað øvugta eisini ber til. Tí er tað ein spurningur um at vísa ábyrgd í ringum sum góðum tíðum, og ikki gera sum summi – taka ábyrgd tá tað gongur væl og so skylda uppá ríkisrættarlig viðurskifti tá tað gongur illa.

Tí er tað allneyðugt at øll taka hond í og hjálpa til at bera byrðarnar, líkamikið um ein er í samgongu ella ikki, heldur enn at standa burtur frá og meta um hvussu stór byrðan er og hvussu hini klára tað.

# 387 skúlanæmingar uttan heilsufrøðing!

ELLA
HEINESEN
Formaður í skúlastýrinum á Ziskatrøð

Ongin heilsufrøðingur hevur verið við skúlan á Ziskatrøð í Klaksvík alt hetta skúlaárið. Hetta er ein stórur trupulleiki fyri allan skúlan, tí næmingarnir fáa ikki kannað sjón, hoyrn og heilsuna sum heild - nakað, ið má gerast, um trivnaðurin skal verða góður. 1. flokks næmingarnir eru tískil ikki kannaðir ta vanligu 1. flokks kanningina, har vanliga meir verður gjørt burturúr. Hetta eigur at verða gjørt, so at tørvir ella brek kunnu staðfestast tíðliga, til tess at barnið kann fáa serkøna hjálp.

Tá ið heilsufrøðingur var á skúlanum, nýttu næmingarnir eisini ofta høvið at tosa við hana, um teir høvdu onkrar trupulleikar at dragast við ella spurningar, teir ivaðust í.

Hetta mugu næmingarnir við skúlan á Ziskatrøð so vera fyri uttan, møguliga alt hetta skúlaárið.

Foreldur at børnum í 1. flokki sendu skriv til Mentamálaráðið, att.: Mary í Garði 28.11.05 um henda stóra trupulleika. Skúlastýrið á Ziskatrøð fekk eisini eitt eintak av brævinum. Sum formaður í skúlastýrinum setti eg meg í samband við leiðaran á heilsufrøðiskipanini eftir nýggjár, har hon lovaði, at lýst skuldi blíva eftir heilsufrøðingi fyrst í februar, men ongin lýsing hevur verið at sæð enn. Tá eg spurdi aftur á Heilsufrøðiskipanini nú í mars, fekk eg at vita, at málið lá á "trappuni", so gott hevði verið at vitað, hvussu leingi tað skal liggja har.

Vit vita væl, at tørvur er á útbúnum heilsufrøðingum, men vit hava havt útbúnan sjúkrarøktarfrøðing, sum hevur klárað hesa uppgávu sera væl. Tá tað kemur til børn í skúlaaldri, megnar ein sjúkrarøktarfrøðingur væl at røkja eitt tílíkt starv. Trupulleikin hjá okkum er, at ongin heilsufrøðingur bleiv settur í starv, tá heilsufrøðingurin, sum var, fór í barnsburðarfarloyvi. Hon hevur arbeitt nógv upp saman við starvsfelaga sínum, sum er útbúgvin heilsufrøðingur og arbeiðir við hin skúlan í býnum.

Í mínum eygum sær tað út til, at henda støðan er komin í av sparingum. Eg haldi ikki, at tað kann vera rætt, at tílíkar sparingar skulu raka 387 næmingar. Loyvi mær at ivast í, hvussu nógv sparing er í hesum.